Starv

# Mekanikari til verkstaðið

Til verkstaðið, sum er undir Farmaleiðum, er eitt áhugavert og mennandi starv sum mekanikari leyst at seta. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

**Arbeiðsuppgávurnar hjá verkstaðnum**
Høvuðsuppgávan hjá verkstaðnum er at umvæla, samskipa og menna viðlíkahaldið av lastbilum, trukkum, lastum o.ø. koyriútbúnaði hjá fyritøkuni.

Aðrar høvuðsuppgávur eru:
- Tryggja ein støðugan rakstur av koyriútbúnaðinum
- Seta upp viðlíkahaldsmannagongdir- og ætlanir
- Hava dagligt eftirlit við koyriútbúnaðinum, herundir samstarv við Bileftirlitið, verkstøð og aðrar myndugleikar

**Starvið fevnir um**
Vanligt viðlíkahaldsarbeiði uppá lastbilar, trukkar, lastir o.a. útbúnað. Viðkomandi sum settur verður, má vera til reiðar at fara á skeið her heima og uttanlanda. Talan er um eitt sera áhugavert og mennandi starv.

**Førleikakrøv**
- Lastbila/trukkmekanikari ella tilsvarandi mekaniska útbúgving
- Stóra koyrikortið
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Áhugaðir skulu senda umsóknina til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

Umsóknin skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 26. august 2002 kl. 12:00.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú venda tær til Heina á Borg, farmaflutningsleiðara, ella Bogi í Gil Verkførara á tlf. 343060 ella e-post: hab@ssl.fo

*Høvuðsuppgávan hjá SL er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá SL javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Skúlavørður

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir skúlavørði til Venjingarskúlan. Arbeiðsøkið er fimleikahøllin á Stórheyggi, ytri skúli við Landavegin og heimari skúli við Fr. Petersens gøtu.

**Arbeiðið**
Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. hesar:
- at røkja bygningar og økið uttan um skúlan
- at halda reint og ruddiligt inni og úti
- at hava umsjón við og samskipa reingerðingina í skúlanum
- at gera umvælingar
- at ljós, hiti og sanitetsviðurskiftini í skúlanum eru í lagi
- at trygdarbúnaðurin virkar sambært ásettum krøvum

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava handverkaraútbúgving, duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevni.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett sum skjótast. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Niels Nattestad, skúlastjóra, tlf. 31 63 17 ella Jákup Simonsen,deildarleiðara á mentamáladeildini í Tórshavnar kommunu, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal veraTórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 8. september 2002. Viðmerk á umsóknina "skúlavørður".

Í Venjingarskúlanum eru 500 næmingar og har starvast 40 lærarar.

SNARSKIVAN

## Bilur til sølu



Peugeot 206 1.9 Diesel. Bláur, 16" sportfelgur, sportkúfangara við tokuljósum, 4 felgur við nýggjum vetrardekkum, 14 mánaðir gamal, er í sera góðum standi. Koyrt 13.000 km.

**Ragnar Magnussen,**
**tlf. 356921 ella 215862**

## Sølufólk

Vit sóknast eftir fólki til gólvdeildina í Vøruhúsinum á Hjalla. Arbeiðið umfatar avgreiðslu av kundum og annað fyrifallandi arbeiði.

Nærri upplýsingar á tlf. 342500 ella 216755, Sólbjørn.

Skrivliv umsókn innan 31. aug. verður at senda til:

LITAVAL P/F
Postboks 1019
110 Tórshavn
st@litaval.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Hoyvíkshøllin verður tikin í nýtslu leygardagin 24. august 2002

**Skrá:**
Kl. 16.00 Havnar Hornorkestur

Jan Christiansen, borgarstjóri, bjóðar vælkomin

Heðin Mortensen, formaður í mentamálanevnd Tórshavnar býráðs flytir fram røðu

Havnar Hornorkestur

Petur Dahl, skúlastjóri, flytir fram røðu

Umboð fyri H71 flytir fram røðu

Havnar Hornorkestur

Kl. 17.00 Steypadystur H71-Kíf 1. deild menn

SNARSKIVAN

## Býráðsfundurin fluttur

Býráðsfundurin, ið lýstur er at verða 29. august, verður ístaðin týsdagin 27. august 2002 kl. 17.30.

**Runavíkar býráð**

## Leiga av ítróttarhøllini

### í Runavík

Tey, ið ætla at leiga ítróttarhøllina í Runavík veturin 2002/2003, skulu senda skrivliga umsókn til býráðsskrivstovuna í seinasta lagi 30. aug. 2002.

**Runavíkar býráð**

Sosialurin



Reparera bilar
Tryggingarskaðar
Upprætting og lakering

Alt mekaniskt arbeiði og styling til bilar

**Auto-Tek**
Argjaboðagøta 5 ·
Tlf. 321206 · Fax 321236
eftir kl. 17.00 á Tlf. 221006

Lesið
Sosialurin
-tað loysir seg



# - Landarar!!!

**P/F SNODD · Toftum, søkir eftir fólki, at landa og til annað fyrifallandi arb., brúk er fyri røskum og dugnaligum fólkum at byrja beinanvegin.**

**Áhugaði kunna venda sær til:**

| | |
|---|---|
| Skrivstovuna | 44 99 94 |
| Dánial | 21 25 60 |
| Jóhannus | 21 70 60 |

**www.SNODD.fo**

Tel. +298 44 99 94 - Fax. +298 44 91 19 - e-mail. snodd@snodd.fo

# Badmintonfelagið í Havn

**telefon 322515 • hbf@post.olivant.fo**

Vit byrja aftur mánadagin 2. september.
Telefonin svarar hesar dagar: 26., 27., 29. og 30. august millum kl. 19.00–21.00.
Um ikki annað er avtalað, fáa motiónistar sama bana sum í fjør og skulu tí ikki melda seg til av nýggjum.
Børn, unglingar og seniorar melda seg til at spæla, tá tey koma til venjingar.
Okkara indiski venjari, Aritra Nandy, venir týsdag og hósdag kl. 15.30–21.00.

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag |
|---|---|---|---|---|
| 15.00–16.30 **Hondbóltur** | 15.30–16.30 **Árgangur '92 og yngri** | 10.00–15.00 **Frítíðarskúlin** | 15.30–16.30 **Árgangur '92 og yngri** | 15.00–16.00 **Hondbóltur** |
| 17.00–18.00 **Børn á byrjunarstøði Árgangur '93 og yngri** | 16.30–17.30 **Árgangur '90 og '91** | 15.15–16.15 **Hondbóltur** | 16.30–17.30 **Árgangur '90 og '91** | 16.00–23.00 **Fótbóltur** |
| 18.00–19.00 19.00–20.00 20.00–21.00 21.00–22.00 22.00–23.00 **Motiónistar** | 17.30–19.00 **Árgangur '89 og eldri** | 16.15–17.15 **Børn á byrjunarstøði Árgangur '90 og '91** | 17.30–19.00 **Árgangur '89 og eldri** | |
| | 19.00–21.00 **Seniorar** | 17.15–18.15 **Børn á byrjunarstøði Árgangur '89 og eldri** | 19.00–21.00 **Seniorar** | |
| | 21.00–22.00 22.00–23.00 **Motiónistar** | 18.15–19.15 **Motiónistar** | 21.00–22.00 22.00–23.00 **Motiónistar** | |
| | | 19.15–21.15 **Hondbóltur** | | |
| | | 21.15–22.15 22.15–23.15 **Motiónistar** | | |

***Prísir, limagjøld v.m. eru at síggja á heimasíðu okkara: www.hbf.fo***